# John væl trimmaður at taka ímóti skotum

**Øll B36 málini í stórsigrinum á Svangaskarði vórðu skorað av landsliðsspælarum, meðan annar av landsliðsmonnunum hjá B68 fram ímóti dystarenda varð rikin av vøllinum**

B68–B36

*Jóannes Hansen*

B36 er framvegis væl við í stríðnum um heiðursmerkini. B68 er fullkomuliga krøkt av í FM stríðnum, og sannlíkið fyri, at teir skulu endurvinna bronsukrónurnar, sum teir ognaðu sær bæði í fjør og í fyrraárið, er burtur eftir tapið á heimavølli týskvøldið.

Størsta heiðurin fyri at tað eydnaðist B36 at vinna tøttu og intensu uppgerðina 4–1 eigur B36 liðformaðurin, John Petersen. Fyri eygunum á landsliðsvenjaranum, Henrik Larsen, skoraði hann trý mál. Eftir hetta er landsliðsvenjarin neyvan í iva um, at John skal vera annars er álopsspælarunum leygardagin.

B68 hevði eina fitta løtu í 2. hálvleiki so mikið gott tak á, at tað luktaði meiri av 2–2, enn at B36 skuldi økja um 2–1 leiðsluna. B68 fekk um endan, eftir at teir høvdu framt dupult útskifting. Fríðin Ziskason fekk meiri tyngd í miðvøllin, har Klæmint Matras og Julian Johnsson høvdu havt lætt spæl í nærdystunum, og Messias Perreira var tryggur í verjuspælinum. Brasilski verjumaðurin hevur ongantíð spælt seg av liðnum, og tað er sera torført at finna grundgevingar fyri, at hann ikki skal vera ímillum teir fyrstu ellivu, og at Fróði Benjaminsen skal vera miðverji.

Fróði verður roknaður sum ein hin fremsti miðvallarin í landinum. Ímóti Liktinstein var hann á miðvøllinum frá byrjan, og hann telist millum uppløgdu evnini til teir fyrstu ellivu ímóti Skotlandi. Men á B68 liðnum var hann aftur ímóti B36 miðverji. Og tað kendist undarligt, tá havt verður í huga, at B68 í 1. hálvleiki hevði lítla lotið undan, og at váti vøllurin var upplagt undirlag at royna við langskotum. Saman við Øssuri Hansen hevur Fróði Benjaminsen í fleiri ár verið størsta skothóttanin úti frá.



*John Petersen nýtti nýggja dystin móti B68 til at staðfesta, at hann eigur at verða sjálvskrivaður í álopinum á landsliðnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Avgerandi løtan

Sekundvísarin hevði akkurát verið runt fyrstu ferð eftir stegðin, tá B36 økti til 2–0. Harvið tóktist dysturin avgjørdur, og mátin, sum málið var til uppá, mundi tyngja B68 liðið. Eftir B36 álop varð bólturin spældur fram ímóti miðstrikuni. Har møtti Julian Johnsson honum. Hann sendi høgt og langt í B68 brotsteigin. Ólukktíð fyri Kjartan Nesá, so var bestikkið hjá honum av støðuni ikki nóg gott. Bólturin støkk í váta vøllin og upp um málverjan fyri síðani at taka í annan stólpan og rulla í mótsatta síðunetið!

Eftir málið, sum minti um tað, ið sæst í piltaliðsdystum, var talan eina løtu um tómgongd. So var tað, at B68 skifti út, og tá fór rættuliga at liggja fyri. John Heri Dam minkaði um munin, tá hann við handara stólpan stútaði innlegg frá Øssuri Hansen í høgru í málið.

Síðani var tað fleiri ferðir um reppið, at B68 javnaði. Næst vóru teir eftir horna, tá dysturin eisini varð avgjørdur. Tvær royndir úr málteiginum vórðu blokeraðar í B36 verjuni, áðrenn Messias sendi upp um málið. So fóru B36 í álop. Teir fingu horna í høgru, Julian Florescu legði innfyri, John Petersen rann ímóti bóltinum og snittaði frammarlaga úr málteiginum sera hegnisliga við høvdinum í mótsatta borð.

Einki var at siga til, at B36 fagnaðurin var stórur. Í staðin fyri 2–2 vóru teir á odda 3–1, og harvið var avgjørt, at øll stigini skuldu til Havnar.

Í síðstu løtu staðfestu teir báðir landsliðsmenninir, ið høvdu skorað málini, so talan gjørdist um stóran sigur. Julian Johnsson royndi við skoti, sum Hans Fróði Hansen møtti við hondini. Ostaskorpan kom úr lummanum hjá Niklasi á Líðarenda, sum leiddi løttu uppgávuna fyrimyndarliga, B68 liðformaðurin fór av vøllinum, og B36 liðformaðurin krýndi stórt avrik við brotssparksmáli.

Fyrsti partur av stóra avrikinum var miðskeiðis í 1. hálvleiki. Eftir uppspæl í vinstru og innlegg frá Magna á Lakjuni, varð bólturin stýrdur til John Petersen í handara borðinum – sera skjóti Bárður Mortansson var runnin diagonalt til nærra stólpan – og skotið hjá John úr tíggju metrum úr høgru var flatt og neyvt.

Ferðin var høg, men tað komu ikki fleiri mál í 1. hálvleiki. Bárður Mortansson var tætt við, tá hann á 35 metra teini sneiddi framvið fleiri og sendi í málverjan, og í hinum endanum var tað vandamikið, tá Fróði Benjaminsen eina einastu ferð var við í álopi, og René Tórgarð akkurát fekk bent langskotinum til horna.

B68: Kjartan Nesá – Oleif Joensen, Hans Fróði Hansen, Fróði Benjaminsen, John Heri Dam – Arnold Joensen, Jann Ingi Petersen, Bogi Petersen – Anders Nygaard, Øssur Jacobsen, Øssur Hansen
B36: René Tórgarð – Arnbjørn Danielsen, Egil Zachariassen, Jens Kristian Hansen – Julian Johnsson, Jákup á Borg, Klæmint Matras – Bárður Mortansson, John Petersen, Magni á Lakjuni

# Føðingardagarnar er hann á Svangaskarði

**Heldur ikki hesa ferð slapp Jens Kristian Hansen at vera við hús føðingardagin, sum hann enn eina ferð var á Svangaskarði**

LANDSLIÐSSPÆLARI

*Jóannes Hansen*

Eitt av størstu ivamálunum viðvíkjandi landsliðnum ímóti Skotlandi hevur verið, hvussu tað fór at vera hjá Jens Kristiani Hansen. Veteranurin, sum hevur spælt 41 landsdystir og hevur skorað trý mál, var á B36 liðnum á Svangaskarði í illveðrinum sunnudagin, og hann var aftur á B36 liðnum týskvøldið. Harvið bendir alt á, at Jens Kristian verður førur fyri at spæla á landsliðnum leygardagin.

Tá tjúgu manna liðið varð úttikið í síðstu viku, varð nevnt her á síðunum, at Jens Kristian Hansen er upplagt val til vinstra verjuborð í fýra manna verjuni, og soleiðis verður tað ivaleyst eisini.

Ofta hava landsdystir verið spældir tíðliga í september. Jens Kristian hevur føðingardag 3. september, og tí hevur hann ofta verið saman við landsliðsspælarunum, tá hann hevur havt føðingardag. Hann var í venjingarlegu til landsdyst, tá hann hevði føðingardag í 1994, 1995, 1997, 1998 og 1999, og í fyrraárið spældu Føroyar 2–2 á heimavølli tann dagin, tá Jens Kristian hevði føðingardag. Í fjør vóru eisini landsdystir á skránni. Tá varð spælt ímóti Luksemborg 1. september og ímóti Russlandi á heimavølli 5. september.



*Hóast Jens Kristian Hansen hevur røtur av Toftum í bæði móðir- og faðirætt, so hevði hann helst vilja sloppið at verið heima á føðingardegnum, nú landsliðið ikki savnaðist fyrr enn dagin eftir, men lagnan vildi, at hann aftur hesa ferð helst føðingardag á Svangaskarði*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í ár bendi alt á, at Jens Kristian Hansen skuldi verða við hús allan dagin 3. september, tá hann fylti 31 ár. Men soleiðis tørnaði tað ikki út.

At landskappingardysturin ímóti B68 sunnudagin skuldi spælast av nýggjum týskvøldið 3. september hevði við sær, at Jens Kristian enn eina ferð var staddur á Svangaskarði, tá hann hevði føðingardag. Men hesa ferð slapp hann til hús at hitta familju og vinir, sum vóru komnir í føðingardag, áðrenn hann fyrrapartin í gjár aftur fór á Svangaskarð at fyrireika seg til landsdyst.

Lesið Sosialin

**Maskinførari**

Royndur maskinførari søkist.

**Maskinkoyring**
Tlf. 211853 – 316653

TK Stovan

**TK Stovan skipar í samstarvi við Skeiðsdepilin í Marknagili fyri skeiði um:**

**COACHING – FRAMTÍÐARINNAR LEIÐSLUAMBOÐ**

**Dagar: 20. og 21. september 2002**
**Fríggjadag kl. 9.00-21.00, leygardag kl. 9.00-12.00**

**Coaching – framtíðarinnar leiðsluamboð!**
Skeiðsdepilin í Marknagili og TK Stovan skipa fyri skeiði um coaching. Coaching er eitt hugtak, ið hevur vunnið størri og størri frama í vinnulívinum. Coaching stavar upprunnaliga frá ítrótti. Leikluturin hjá einum coach er at motivera ítróttarfólki at gera sítt besta, at nýta allar sínar ressourcir, at tryggja at ítróttarfólkið tekur ábyrgd av sínum gerðum og avgerðum og roynir sjálvstøðugt at loysa trupulleikar.

**Hvat hevur coaching við vinnulív at gera?**
Coaching kann eisini nýtast sum leiðsluamboð í virkjum og á stovnum. Í framtíðini skal leiðarin evna at motivera starvsfólkini at taka ábyrgd fyri uppgávunum og eggja starvsfólkini til sjálvi at finna loysnir.

Sum luttakari á skeiðinum fær tú innlit í coaching og í hvørji amboð tú kann nýta í coaching processini.

Skeiðsleiðari er Bo Echwald. Hann hevur eitt heimsmeistaraheitið og tvey danmarksmeistaraheitið innan sigliítróttina. Eisini hevur Bo Echwald royndir í vinnulívinum, m.a. sum marknaðarleiðari fyri Nike Danmark og Yonex. Bo Echwald hevur í 10 ár arbeitt sum sjálvstøðugur ráðgevi, m.a. við leiðslumenning, coaching, teambuilding og samskifti.

Skeiðið er ætlað leiðarum, millumleiðarum og annars teimum, ið hava áhuga fyri evninum.

**Skrá: 20/9-02**
**9.00-12.00: Coaching – hvat er tað?**
· munurin millum leiðara, venjara og coach
· hvat kannst tú vinna við coaching og nær er tað hent at nýta coaching?
**Kaffisteðgur**
**Coaching og umstøðurnar**
· hvat krevst av umstøðunum fyri at nýta coaching sum leiðsluhátt
**12.00-13.00: Matarsteðgur**
**13.00-18.00: Skapa motivatión og undirtøku við coaching**
· Sum coach er tað uppgáva tín at vegleiða, motivera og fremja evnini hjá starvsfólkunum til sjálvi at finna loysnir
· hvussu kannst tú skapa motivatión og undirtøku hjá starvsfólkunum og hvussu kanst tú nýta coaching sum førleikamennandi amboð
**Kaffisteðgur**
**Coaching laga til tann einstaka**
· hvussu fær tú greiðu á, hvat motiverar hvørt einstakt starvsfólk og hvussu motiverar tú starvsfólkini
**18.00-19.00: Matarsteðgur**
**19.00-21.00: Coaching – eisini ein spurningur um álit**
· hvussu kanst tú virka sum coach, ið stuðlar og vegleiðir
· hvussu kanst tú lata upp í hendurnar á starvsfólkunum at taka avgerðir – uttan at missa yvirlit

**Skrá: 21/9-02**
**9.00-12.00: Samskifti í coaching**
· eitt gott samskifti er avgerðandi, tá tú ert coach
· fá íblástur til, hvussu tú samskiftar effektivt
**Kaffisteðgur**
**Coaching samrøðan**
· hvussu fer coaching samrøðan fram?
**Taka saman um**

**Tilmelding:** TK Stovan, fax nr. 31 93 63, tlf. nr. 31 73 66 ella teldupost tk@tk.fo.
Skeiðsdepilin á Marknagil, tlf. nr. 31 88 13 ella teldupost mb@hsh.fo
**Kostnaður:** kr. 3200,- uttan mvg. Við í luttøkugjaldinum er skeiðstilfar og matur.
Tilmeldingin er bindandi.

Virkisnavn: Tal av luttakarum:
Navn/nøvn:
Tel.: Fax:

**TK Stovan**
Niels Finsens gøta 37, FO-100 Tórshavn
**Tel** +298 317366, **Fax** +298 319363
tk@tk.fo
www.tk.fo

**VILJI VITAN VØKSTUR**
TK Stovan er ein liður í menningini av føroyska vinnilívinum og samstundis ein partur av tí umfevnandi danska TIC-kunningarsamstarvinum.

SØLUFÓLK
TIL KØKSDEILDINA

**Køksmiðstøðin søkir eftir sølufólki at byrja beinanvegin.**

**Arbeiðsuppgávur**
• Vit sóknast eftir einum starvsfólki, ið veit hvat orðini service og kundatænasta merkja.
• Tú skal kunna hjálpa viðskiftafólki okkara við val av sniði, farvum, materiale o.m.a.
• Tú mást kunna hjálpa okkara viðskiftafólki við kreativum hugskotum.
• Fylgja teirra ynskjum við tínari servitan.

**Vit vænta…**
at tú ert ágrýtin, stinn/ur, dugnaligur og dugur at veita viðskiftafólkum okkara eina góða tænastu.
• Tú hevur royndir innan sølu og eyga fyri innrætting.
• Tú kennist við teldu.

**Vit bjóða tær…**
eitt áhugavert starv í einum spennandi og fjølbroyttum umhvørvi. Løn og treytir verða ásettar í samsvari við útbúgving og royndir.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan **16.09.2002** og skal sendast til:

Køksmiðstøðin
Á Hálsi
110 Tórshavn
att: Vinjard Johansen

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsing um starvið fæst við at seta seg í samband við Vinjard Johansen, leiðara, á tel. 22 40 51.

Elkeyp
HTH Køksmiðstøðin
Á Hálsi • FO-100 Tórshavn • Tel. 31 49 49 • Fax 31 13 30

**KARISMA skipar fyri ferð til Bergens við Atlantsflog**

Um nóg stórur áhugi er, skipar KARISMA fyri ferð til Bergens.

Ferðin verður gjørd í samband við heyst-evnisskeið og ungdómsráðstevnu á Levende Ord

**Ferðaætlan úr Føroyum:**
Úr Vágum týskvøldið 15. oktober kl. 18.30.
Úr Bergen leygardagin 19. oktober kl. 18.30.

**Kostnaður báðar vegir 2.100,00 kr.**

Ferðaseðlar verða fyrst latnir teimum, sum tekna seg til evnisskeiðið ella ungdómsráðstevnuna. Um pláss er eftir, kunnu onnur áhugaði eisini koma við.

Skipað verður fyri gisting og flutningi hjá teimum, sum tekna seg til tiltøkini á Levende Ord.

**Kostnaður fyri gisting á gistihúsið 4 nætur: 1.000,00 kr.**

Eisini ber til hjá áhugaðum í Noregi at keypa ferðaseðlar til Føroya og aftur.

**Ferðaætlan úr Noregi:**
Úr Bergen týskvøldið 15. oktober kl. 21.30.
Úr Vágum leygardagin 19. oktober kl. 16.30.

**Kostnaður báðar vegir 2.100,00 kr.**

Bílegging og tilmeldan áðrenn 22. september á telefon 314088 - 214088 - 221499
e-mail: danjac@kallnet.fo

**KARISMA**